# Týsklandi gjørdi av við Portugal

Fyrsta fjórðingsfinalan í EM-endaspælinum endaði við, at Týskland vann á Portugal. Spenningurin var stórur til dystin, og tað vóru fleiri, sum høvdu hug at gera Portugal til favorittar. Men tað vóru týskararnir, sum vunnu dystin. Týsklandi legði seg á odda 2-0 tíðliga í dystinum við málum frá Schweinsteiger og Klose. Nuno Gomes minkaði til 2-1, men Ballack skoraði so til 3-1. Heldar Postiga minkaði til 3-2 móti endanum av dystinum, og tað gjørdist úrslitið.



# U15 landsliðið tikið út

Landsliðsvenjararnir Eli Hentze og Mathias Davidsen hava tikið spælarar út til U15 landsliðið, sum skal taka lut í altjóða kapping í Aberdeen í juli mánaði. Úttiknu spælararnir eru hesir: Oddmar Marsten, Ísak Simonsen og Petur Andreassen KÍ, Jàkup Andrias Hansen EB/Streymur, Hallgrím G. Hansen Víkingur, Sverri Mohr Mortensen, Bárður Guttesen, Jóhan á Plógv, Magnus Egilsson, Ári Danielsen og Rói av Fløtum Jespersen HB, Haraldur Reinert Højgaard B68, Jákup Svenbjørn Olsen MB, Rúni Seloy og Ernst Remmel B36, Ragnar Tausen og Brandur Magnusarson TB/VB, Andrias Eriksen Varde.

NSÍ-B68 2-0 (1-0):

# NSÍ spældi trý stig heim

*NSÍ*

*B68*

**NSÍ hevði leikliga yvirvág í dystinum ímóti grannunum, og runavíkingar fingu eisini øll trý stigini burtur úr dystinum**

**NSÍ-B68**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Føroyameistararnir NSÍ høvdu hóskvøldið vitjan av grannunum av Toftum í seinasta dystinum í 11. Umfari av Formuladeildini.

Dysturin gjørdist ikki so intensur og tættur, sum grannadystirnir millum liðini ofta eru, og tað vóru gulu favorittarnir, sum vóru ománá so at siga alla tíðina.

NSÍ spælið var hampuligt, spælararnir fluttu bóltin millum sín, men stundum manglaði broddur í álopsspælinum, og tað vóru ofta góðar løtur millum málmøguleikarnar.

B68-liðið formáddi sær ov lítið fram eftir vøllinum. Kviku álopsspælararnir Jacob Bymar og Ameth Keita løgu og lúrdu eftir møguleikum, men verjan hjá Óla Hansen var trygg mesta av tíðini.

## Mál og reytt kort

NSÍ skoraði eitt mál í hvørjum hálvleiki. Øssur Dalbúð hevði aftur hesaferð fingið kjansin í álopinum, og tað kvitteraði hann fyri við einum máli. Bogi Løkin vann bóltin frá B68-liðnum, Hjalgrím Elttør varð sendur avstað, og tá han sendi inn fyri málið, fekk Øssur avgerandi fótin á, hóast hann var hart trýstur.

Í seinna hálveiki var tað liðformaðurin Óli Hansen, sum skoraði, og málið kom eftir mest dramatisku hendingina í dystinum. B68-málmaðurin og NSÍ-framherjin Andy Olsen brustu saman, og dómarin kendi seg sannførdan um, at B68-málmaðurin hevði brotið seg. Hann gav Vlada Filipovic reyða kortið og dømdi brotsspark. Útispælarin Badara fór í málið, men hann megnaði ikki at steðga skotinum hjá Óla.

Seinni hálvleikur myndaði seg í stóran mun soleiðis, at NSÍ hevði tak á støðuni, B68 hevði onkrar royndir, men tað vóru ov tannleysar og góvu einki mál.

NSÍ togaði seg við hesum sigrinum nærri HB og B36, men tað er framvegis langur teinur fram til EB/Streym á fremsta plássinum.



NSÍ hevði munin í grannadystinum ímóti B68, og 2-0 sigurin var uppiborin




## FAKTA um dystin

**NSÍ-B68 2-0 (1-0)**
**1-0:** Øssur Dalbúð, 35.
**2-0:** Óli Hansen, 89.
**Dómari:** Eiler Rasmussen
**B68:** Tórður Thomsen - Aco Pandurovic, Óli Hansen, Johan Troest Davidsen, Einar Hansen - Bogi Løkin (Andy Olsen, 71.), Nenad Stankovic, Sjúrður Jacobsen, Milan Pejcic (Filip Jacobsen 85. min), Hjalgrím Eltør - Øssur Dalbúð (Jónhard Fredriksberg, 45.)
**B68:** Vlada Filipovic - Øssur Hansen (Badara Diedhiou 49.), Arnbjørn Danielsen, Ovi Magnussen, Niklas Joensen - Kristian Anthon Andreasen, Jann Ingi Petersen, Ndende Adama Gueye (Jonleif Højgaard 85.), Jóan Símun Edmundsson (André Olsen 54.) - Ameth Keita, Jacob Bymar
**Gult kort:** Jann Ingi Petersen, Badara
**Reytt kort:** Vlada Filipovic

# Tveir nýggir á KÍ liðnum

**KÍ-EB/STREYMUR**
*Jákup Mørk*

Tað hevur verið tepurt við fólki hjá KÍ, men nú tykist síggja eitt sindur ljósari út. 24 ára gamli amerikanski álopsspælarin, Joe Zewe, sum hevur vant í Klaksvík seinastu vikurnar, verður eftir øllum at døma fyri fyrstu ferð við í KÍ hópinum sunnudagin. Tað verður miðvallarin Emil Nolsøe Leifsson eisini. Hann hava klaksvíkingar fingið úr HB.

Nýggja støðan ber við sær, at KÍ venjarin skal taka støðu til, um hann skal skifta út á liðnum, sum ikki hevur tapt átta tær seinastu ferðirnar.

Í EB/Streymi er lagið avbera gott. Eftir at samansetta liðið leygardagin fyri einari viku síðani annað árið á rað tryggjaði sær Løgmanssteypið, eydnaðist tað mikukvøldið væl og virðiliga at styrkja um oddasessin í Formuladeildini. EB/Streymur vann fulla úrtøku á heimavølli ímóti B71, og sigurin gjørdist eyka søtur, tá ið báðir teir næstu kappingarneytarnir snávaðu.

Sigurin í Gundadali mikukvøldið hevur sjálvandi borið við sær, at fótbóltstemperaturin í Klaksvík er hækkaður. Hetta saman við tí sannroynd, at tað er sannførandi oddaliðið, sum fer at vitja, fer ivaleyst at hava við sær, at áskoðarafjøldin verður stór.

Í EB/Streymi eru allir spælararnir tøkir. Mikukvøldið gav Sigfríður Clementsen Fróða Clementsen møguleikan á høgra vongverja, meðan Levi Hanssen var á sentralum miðvallarplássi og Brian Olsen var á beinkinum fyrsta tíman.